Skjal (11)

FAKFELAGSSAMSTARVIÐ
samstarv@samstarv.fo

Tórshavn, 13. september 2018

# Hoyringssvar

## Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (Vælferðarlóg)

Fakfelagssamstarvið fegnast um, at ein føroysk vælferðarlóg nú kemur, ið tekur støði í føroyskum viðurskiftum. Hendan lógin hevur leingi manglað og fer vónandi at virka til eitt betri skipað øki.

At verandi siðvenjur og tulkingar av galdandi lóggávu eru skrivaðar inn í lógina, fer at gera tað lættari hjá borgarunum at finna og skilja galdandi rætt og tí bøta munandi um rættartrygdina.

Vælferðartænasturnar verða skipaðar so, at so nógv sum gjørligt kunnu fáa og varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Tað sæst m.a. í **§ 3, stk. 1 nr. 2** og tilhoyrandi viðmerkingum við, at tað í sambandi við veiting av hjálp eftir vælferðarlógini verður lagdur dentur á virkisføri, og at borgarin fær gagnnýtt teir førleikar, ið hann hevur.

Í hesum sambandi er tað tó umráðandi, at persónurin ikki bara varðveitir eitt tilknýti til arbeiðsmarknaðin sum heild, men eisini til sítt (lívs)yrki. Hetta er serliga, um ein persónur, sum hevur útbúgving ella drúgvar royndir innan eitt ávíst arbeiðsøki, brádliga hevur tørv á hjálp eftir vælferðarlógini fyri ikki at missa virkisførið, førleikarnar ella tilknýtið til sítt lívsyrki. Hesin sami persónur hevur tó møguliga ikki tørv á hjálp eftir vælferðarlógini til at varðveita sítt virkisføri, førleikar ella tilknýti til tann generella arbeiðsmarknaðin. Henda støðan hevði serliga verið viðkomandi í sambandi við ymisk hjálparráð, viðlíkahaldsvenjing, endurvenjing o.a. – heldur enn uppihaldsveiting. Sum dømi kann nevnast **§§ 26, 29, 30 og 31**.

Viðv. **§ 3, stk. 2** verður tað mett óheppið, at tað er sami myndugleiki, ið skal veita ráðgeving og vísa á møguleikar fyri stuðul o.a., sum skal umsita játtanina til somu tænastur og møguleikar. Avleiðingin av hesum kann hugsast at verða tann, at borgarin ikki fær best møguliga menningartilboð, men heldur tað tilboð, sum samsvarar við tað, sum myndugleikin metir seg fáa játtan til.

Fakfelagssamstarvið fegnast serliga um nýggja undantakið til, hvat er at meta sum ogn í **§ 20, stk. 5, nr. 2**. Broytingin kann gera stóran mun fyri nógvar fakfelagslimir generelt, ið – via sítt fakfelag – hava slíkar tryggingaravtalur.

Nýggi møguleikin til at fáa endurgjald fyri mista inntøku í sambandi við ansing av nærskyldum við seinheilaskaða, sum ikki hevur fingið pláss á vardum bústaði eftir **§ 25, stk. 1, nr. 3,** letur nýggjar dyr upp. Hetta má tó ikki í realitetinum enda við, at viðkomandi, sum verður ansaður, verður tikin í síðstu røð, tá viðkomandi skal fáa bjóðað pláss á vardum bústaði. Í so fall kann hetta skaða persónin, sum ansar, sum kann koma til at vera uttan tilknýti til arbeiðsmarknaðin í longri tíð, serliga tá tað verður tikið atlit til, at tað er ein treyt fyri endurgjaldið, at viðkomandi er farin av arbeiðsmarknaðinum.

Tøl og upphæddir eru ymsastaðni í lóggávuni dagførdar við grundgeving um, at tølini eru frá t.d. 2009. Hetta er tó ikki gjørt gjøgnumgangandi. Avleiðingin av hesum má vera, at innanhýsis forholdið millum veitingarnar ymsastaðni ikki samsvara við hvørja aðra. Hetta verður gjørt uttan grundgeving í viðmerkingunum. Sum dømi kann nevnast **§§ 26 og 30.**

Viðvíkjandi borgarastýrdari stuðulstænastu eftir **§ 36** eru nakrir vansar. Tó at vit væl skilja tankan um borgarastýrda stuðulstænastu, kann tað hava við sær, at fakførleikin verður frávaldur, møguliga tí at ófaklærd kunnu hugsast at vera bíligari, ella tí vinir og kenningar skulu hava eina inntøku. Hetta kann vera við til at leggja trýst á borgaran at taka avgerðir, ið ikki eru til gagns fyri viðkomandi.

Tað kann vera torført at meta um, hvat er "munandi og varandi skert virkisføri" eftir **§ 38,** og hvussu hetta nærri skal metast, verður ikki nevnt. Í hesum sambandi meta vit tað eisini umráðandi, at tað skerda virkisførið ikki bara verður mett út frá aldurssvarandi virkisføri, men tað reella og persónliga virkisførið hjá borgaranum – eisini tá tað viðvíkur teirra arbeiði og serligar førleikar, ið krevjast hertil, sí viðmerking omanfyri til § 3.

## Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin

Lógin tykist í allar mátar at avspegla, at talan er um eitt reelt undantak til grundlógartryggjað frælsi. Við at hava úttømandi uppreksanir, konkretar metingar og vera stýrd av proportionalitetsprinsippinum við beinleiðis at vísa á, at eitt minni inntrivandi inntriv altíð skal roynast fyrst, veitir lógin gjøgnumskygni og økta rættartrygd á økinum. Sum dømi kann nevnast **§ 11, stk. 1, nr. 3**.

Vit mæla til, at eitt ískoyti verður lagt aftrat greinini um endamálið við lógini. Sum **nýtt § 3, stk. 6** kundi staðið, at endamálið við lógini eisini er at sleppa undan at fremja inntriv, ið føra til tvingsul ella avmarkingar í sjálvsavgerðarrættinum.

Vit mæla til eitt ískoyti til grein 4 um tvingsilsnevndina sum eitt **nýtt § 4, stk 2**. Nevndin eigur at góðkenna fyribils "virkisætlanir", ið serliga eru gjørdar eftir eini tvingsilsstøðu, og ið hava til endamáls at arbeiða við at umganga, at borgarin ella starvsfólk kemur í tvingsilsstøðu ella harðskapsstøðu.

Viðvíkjandi skráseting og fráboðan í **§ 22**, verður sjálvandi tikið undir við, at hetta skal gerast. Hetta má tó gerast soleiðis, at tað er skjótt, lætt og úrslitagott at skráseta og fráboða. Tað hevur tí týdning í hesum sambandi, at ein afturboðan verður gjørd til starvsfólkini, soleiðis at tey vita, hvat fyriferst. Sum støðan er í dag, tykjast fleiri at halda, at fráboðanir um t.d. harðskap bert enda í skuffum. Tað hevur eisini týdning at tryggja, at starvsfólk eru vitandi um, hvussu lógin virkar, og hvat og hvussu tingini skulu viðfarast, soleiðis at tey eru klødd til uppgávuna.

Avleiðingin av at starvsfólk skulu skráseta hvørt inntriv, samstundis sum at tey ikki hava innlit í, hvussu hesar upplýsingar verða brúktar, kann vera, at reglurnar um skráseting og fráboðan ikki verða virdar í praksis. Hetta kann mann ímynda sær serliga vera galdandi hjá teimum stovnum/starvsfólkum, ið regluliga eru úti fyri – ella eru noydd at fremja – harðskap og har skráseting og fráboðan tískil skjótt kann gerast ein tíðarkrevjandi partur av arbeiðinum. Hetta er óheppið, tá hesir somu stovnar kunnu hugsast at vera teir, sum í størstan mun kundu gagnnýtt hesa skipan í sambandi við fyribyrging o.a.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.**

Onga viðmerking

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**

Onga viðmerking

**Uppskot til løgtingslóg um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum**

Onga viðmerking

**Vegna Fakfelagssamstarvið,**

Súni Selfoss, formaður í Starvsmannafelagnum
Óluva í Gong, forkvinna í Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Ole Jensen, formaður í Akademikarafelag Føroya
Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag
Vigdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag
Herálvur Jacobsen, formaður í Føroya Lærarafelag